Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Karlot Hergeirsson, løgtingsmaður

Svarari: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Ferjulegur og atløguviðurskiftini á Syðradali og í Klaksvík

Spurningar:

1. Er arbeiðið uppá ferjuleguna á Syðradali liðugt?
2. Um ja, hvat hevur arbeiðið kostað?
3. Um nei, hvat væntar landsstýrismaðurin, at tann endaligi kostnaðurin er at tillaga ferjuleguna og atløguumstøðurnar á Syðradali?
4. Hvat væntar landsstýrismaðurin, at tann endaligi kostnaðurin er at tillaga ferjuleguna og atløguumstøðurnar á Syðradali og í Klaksvík?

Viðmerkingar:
Vísandi til § 52a spurning (52-023/2025) frá Beinir Johannesen, løgtingsmanni, svarar landsstýrismaðurin *at arbeiði var liðugt og avhendað miðan aug. 2025.* Eisini stendur í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026, at *Arbeiðið við ferjuleguni á Syðradali er liðugt*. Hetta fæst illa at passa við tað, undirritaði bæði hoyrir og skilir, eins og at tað eisini kemur fram í einum tíðindastubba hjá KVF tann 29. okt. 2025, sum endurgevur eini sms-boð frá stjóranum á SSL, at enn verða tillagingar gjørdar, og eftirmetingar verða gjørdar áhaldandi, og tá komið er út á várið, verður tikið saman um royndarsiglingina hjá Teistanum.
Í omanfyri nevnda spurningi varð eisini spurt um kostnaðin, og verður svarað, *at brúktar er 6,7 mió uppá Syðradal,* sum tá er avhendað og liðug, og *verandi atløgu á Stongunum mett til at kosta millum 2,5 til 3,0 mió. kr.*

Um ferjulegan ikki er liðug og klár til Teistan, sum annars kemur fram í svarinum uppá 52-023/2025, hvør verður so samlaði kostnaðurin uppá allar tillagingar á Syðradali? Í samlaða kostnaðinum eigur at verða tikið við, at Teistin liggur við manning í Klaksvík og ger onkra royndarsigling av og á. Eisini skal takast við "rima-verkið", sum kaiin á Syðradali má leingjast við.

Undir orðaskiftinum um eykajáttan á heysti 2024 (LM-008/2024), har pengar vórðu játtaðir til hesar tillagingar, vóru tað fleiri løgtingsfólk, sum settu spurningar, um nú kostnaðarmetingin fór at halda. Tá var ætlanin at flyta rampuna úr Skopun til Syðradals, men í álitinum verður hetta víst aftur. Har stendur: *Til hetta endamál verður biðið um 7,7 mió. kr. Nevndin hevur fingið upplýst, at hetta er dagførda kostnaðarmetingin at flyta rampuna og til arbeiðið í Syðradali, og mett verður, at hon fer at halda. Neyðugt verður møguliga at gera nakrar smærri tillagingar á ferjuleguna í Klaksvík; hetta verður kannað í løtuni. Hetta arbeiðið verður mett at kunna verða gjørt innanfyri verandi játtan.*

Á Løgtingi, 31. oktober 2025

Karlot Hergeirsson